# Lovprísar Fólkaflokkinum

**LOVORÐ** Rodmundur Nielsen hevur skúgvað allan iva til viks um, hvar hann hoyrir heima politiskt

Áki Bertholdsen

Seinastu tíðina hevur nógv verðið spekulerað í politisku framtíðini hjá Rodmundi Nielsen, varatingmanni fyri Fólkaflokkin.

Tað ljóðaði einaferð, at hann var ikki nøgdur við arbeiðslagið í flokkinum og leysasøgur gingið enntá um, at hann var við í ætlanum hjá útbrótaranum, Poul Michelsen, um at stovna ein nýggja, frælslyntan fullveldisflokk.

Onkuntíð hevur hann eisini latið okkurt orð falla, sum vísti eina ávísa ónøgd við arbeiðslagið í flokkinum.

Í hesum sambandi segði hann við Rás2 síðst í oktober, at hann vitsti ikki um hann fór at taka sætið á tingi aftur.

Hann segði eisini, at hann tók undir við atfinningunum hjá Poul Michelsen og hann hann leingi hevur hildið, at grundsjónarmiðini hjá flokkinum eru við at fjara burtur.

Men skuldi nakar ivast í politisku støðuni hjá Rodmundi Nielsen, varð allur ivi skúgvaður til viks á kvøldsetuni hjá Fólkaflokkinum í Øravík í farnu viku.

Har hevði hann eisini orðið og helt eina røðu, sum var ein long lovprísing av arbeiðslagnum í Fólkaflokkinum og av avrikunum hjá ting- og landsstýrismanningini hjá flokkinum.

- Stemningurin innanfloks í Fólkaflokkinum er ótrúliga behagiligur, sigur Rodmundur Nielsen í røðu síni, sum illa kundi uppfatast øðrvísi enn ein treytaleysur stuðul til Fólkaflokkin.

### Ótrúliga góð fólk

Hann staðfesti, at hóast okkurt fer út ímillum rivini viðhvørt, er virðingin fyri teimum ymisku sjónarmiðjunum, stór.

- Arbeiðslagið er gott og tað eiga vit at virðismeta.

Hann lovprísaði eisini nýggja formanninum, sum eisini er nýggjur formaður í fíggjarnevndini, tí hann heldur, at Jørgen er akkurát rætti maðurin til tað starvið.

- Formaðurin og landsstýrisfólkini eru ótrúliga góð fólk, sum hava tænt flokkinum ómetaliga væl í samgonguni.

- Eg eri øgiliga bjartskygdur um framtíðina hjá Fólkaflokkinum, sigur Rodmundur Nielsen.

- Hóast ta virkar eitt sindur turbulent úteftir og hóast Poul Michelsen er rýmdur, sær tað gott út og veljarakanningarnar eru ikki so galnar, men tað manglar eitt lítið sindur enn, sigur varatingmaðurin av Glyvrum.

aki@sosialurin.fo



IVIN BURTUR

*Tað er ótrúliga behagiligt í Fólkaflokkinum, sigur Rodmundur Nielsen*



KARANTENA

*Hereftir skal tað verða alvorliga dýrt fyri arbeiðisleys at nokta at taka av eimum arbeiðstilboði frá Als ella at lata vera við at møta á skeiði, sum Als skipar fyri*

# Harða revsing frá ALS fyri at nokta at arbeiða

**ONKI ÚTGJALD** Treytirnar hjá teimum, sum eru skrásett í Als, verða nú munandi harðari, enn tær hava verið

Áki Bertholdsen

Nú skal tað verða munandi verri hjá teimum arbeiðsleysu, sum ikki vilja taka av, tá ið ALS vísir teimum á arbeiði.

Tað verður eisini munandi strangari fyri tey arbeiðsleysu, sum ikki møta á skeiði, sum Als skipar fyri.

Tað hevur stýrið fyri ALS samtykt og tað fer Johan Dahl, landsstýrismaður í vinnumálum, nú eisini at leggja fyri Løgtingið, so at tað kann verða samtykt og sett í verk.

### Nógv longri karantenu

Sum støðan er nú, verða arbeiðsleys, hvørja ferð, tey ikki taka av einum arbeiðstilboði frá Als, sett í karantenu í fýra vikur, sigur Ernst Jacobsen, stjóri í Als.

Tað merkir, at tey fáa onki útgjald í fýra vikur.

Og karantenan er fýra vikur, sama, hvussu ofta tey nokta at taka av einum arbeiðstilboði, uttan at hava læknaváttan ella aðra haldgóða orsøk fyri tí.

> **Arbeiðsleys kunnu missa útgjald í eitt hálvt ár**

Hinvegin kunnu arbeiðsleys uttan at tað fær nakrar sum helst avleiðingar, lata vera við at møta á skeiði, sum Als skipar fyri hóast tað frammanundan er avtalað, at tey skulu møta á skeiðnum.

Men nú verður alt hetta nógv strangari.

Fyrstu ferð ein ikki tekur av einum arbeiðstilboði, verður karantenan fýra vikur, akkurát sum nú.

Men aðru ferð, ein arbeiðsleysur ikki tekur av einum arbeiðstilboð uttan at hava haldgóða orsøk, verður karantenan átta vikur.

Triðju ferð verður karantenan 12 vikur og fjórðu ferð verður hon eitt hálvt ár.

Sostatt er greitt, at hereftir verður tað alvorliga dýrt fyri arbeiðsleys at nokta fyri at fara til arbeiðis, uttan at hava læknaváttan ella aðra haldgóða grund fyri at nokta.

### Missa útgjald

Hereftir verður tað eisini hart revsað, tá ið arbeiðsleys ikki møta til tey skeið, sum Als skipar fyri, uttan at hava haldgóða orsøk til tað.

Als skipar javnan fyri førleikagevandi skeiðum og tá er avtalað frammanundan við hvønn einstakan arbeiðsleysan, hvør skal á skeið.

Samstundis fáa tey útgjald úr Als ímeðan tey eru á skeiði.

- Men tað hendir seg hvørja ferð, at onkur ikki møtir kortini og tað er dýrt fyri Als, tí vit hava goldið fyri skeiði, sigur Ernst Jacobsen.

Hereftir verður tað tískil soleiðis, at møtir ein ikki á skeiði, sum avtalað er gjørd um, skal tann arbeiðsleysi sjálvur gjalda fyri skeiði.

Tað verður so mótroknað í útgjaldinum frá Als.

Talan kann verða um alt frá eini 2000 krónum til fleiri tíggjutúsund krónur, sum tann arbeiðsleysi missur í útgjaldi, alt eftir, hvat skeið, talan er um, og, hvussu drúgvt tað er.

Aðru ferð, arbeiðsleys ikki møta á skeiði, sum er avtalað við Als, skulu tey ikki bara rinda fyri skeiði, tí tá missa tey harafturat eisini útgjaldið úr Als í fýra vikur.

Endamálið við herðingini er, at arbeiðsleys skulu í nógv størri mun, eggjast til at fara aftur til arbeiðis so skjótt sum tilber.

> **Kunnu fáa rokning frá Als upp á fleiri túsund krónur**